


Súla/Stelkur leitimiðið liggur tætt við markið. Kort Statoil.

# Statoil søkt Jarðfeingi um loyvi at bora Súla/Stelkur brunn

**Jan Müller**

15.03.2014 - 18:06

Oljan.fo

Jarðfeingi boðar á heimasíðu síni frá, at tað hevur móttikið umsókn frá Statoil Faroes, ið er fyristøðufelag fyri leitiloyvi 008, at bora leitibrunn 6104/25-1 á Súlan/Stelkur leitimiðinum.

Áðrenn farast kann undir leitiboring eftir kolvetnum, skulu myndugleikar góðkenna ætlanina. Høvuðsdentur í viðgerðini av eini boriumsókn er at tryggja, at virksemið verður gjørt forsvarliga við atliti til heilsu, trygd og umhvørvi.

Pallurin, ið fer at verða nýttur til hesa boriverkætlanina, West Hercules, verður tann sami, sum verður nýttur til at bora brunnin 6104/21-2, Brugdan ll, í leitiloyvi 006. Brunnurin 6104/21-2, Brugdan ll, verður tann fyrri av teimum báðum, ið verða boraðir í ár, og verður ætlandi farið undir hann í apríl.

Loyvishavarar í L008: Statoil er fyristøðufelag (40%), Dong Energy (30%), OMV (30%)